Dagur: 7.mars 2018, kl.19 Staður: Reinsaríið, Tórshavn

Mikudagin, tann 7. mars 2018 var aðalfundur hjá Føroya Tónleikarafelag á Reinsarínum. Fundurin var smbr. innkallingini ætlaður at umskipa felagið og dagføra viðtøkurnar. Hetta hevur leingi verið í umbúna, og er m.a. framhald av samtyktum frá seinasta aðalfundi. Fundurin varð innkallaður á sosialu miðlunum umframt við meyli til allar kendar adressur hjá limum í undirfeløgunum uml.160 í tali.
Sostatt var fundurin rættstundis innkallaður og viðtøkuførur

Fundarskráin varð henda:

Vælkomin og kunning um skránna
1) Val av fundarstjóra
2) Samadráttur um søgu, orsøk og endamál við umskipanini
3) Tillagaðar viðtøkur – uppskot til samtyktar
4) Nevndarval smb. broyttu viðtøkunum
5) Framløga av tilboði um Ferða- og tóltrygging til atkvøðugreiðslu
6) Áseting av limagjaldi
7) Skráseting av limum

Kjak og endi.

Ad. 1 Torleik Mortensen, formaður beyð vælkomin og varð valdur til fundarstjóra eftir uppskoti nevndarinnar.

Ad. 2 Kristian Blak greiddi frá uppruna til felagið, virki og endamálinum við umskipanini.

Ad. 3 Gjøgnumgongd av viðtøkunum grein fyri grein, við spurningum og frágreiðingum. Hvør grein sær samtyktar so hvørt. Endað við samlaðari góðkenning. Aðalfundurin hevur sostatt broytt viðtøkur felagsins pr. 7. mars 2018.

Ad. 4 Samb. júst samtyktu viðtøkunum, verða 2 nevndarlimir at velja maka ár. Lutakast varð um, hvør limur skal vera sitandi uttan val til næsta ár. Tað gjørdist Kristian Blak, sum sostatt stendur fyri vali í 2019.

Fyri vali hesuferð stóðu: Torleik Mortensen og Jóhannus á Rógvu Joensen. Báðir tóku við afturvali og onki annað valevni var í uppskot. Tí varð ikki neyðugt við skrivligari atkvøðugreiðslu, men vórðu báðir afturvaldi við lógvabresti.

Atkvøðugreiðsla var um tiltakslim. Valevnini vóru Jón Aldará og Elin Klein Joensen. 25 fólk greiddu atkvøðu og tað gjørdist Elin, ið varð vald tiltakslimur felagsins.

Ad. 5 Marjun Svartafoss legði fram um ferða- og tóltrygging frá Trygd, sum nevndin mælir til at seta í verk við virknaði frá 1. apríl 2018. Fundarfólki samtykti og tók einmælt undir við hesum.

Ad. 6 Nevndin skeyt upp, at limagjaldið er 100 kr. um mánaðin, og at limir undir 26 ár. skulu rinda ½ prís, t.v.s. 50 kr. um mánaðin. Hetta var einmælt samtykt.

Ad. 7 Limalistin gekk runt millum fundarfólki til skrásetingar og dagføringar.

Ongi onnur mál til støðutakan vórðu á skránni.

Fundur lokin kl. 20:30

Fundarstjóri

....................................................

Torleik Mortensen

Váttað:

.................................................... ....................................................

Kristian Blak Knút Háberg Eysturstein